# Takk fyri, at tú nýtir Logting.fo

Okkara endamál er at hjálpa tær at finna tilfar og annað, sum tørvur er á fyri at kunna fylgja arbeiðinum í Løgtinginum. Hesin politikkur er skrivaður fyri at hjálpa tær at skilja, hvørjar upplýsingar tú hevur givið okkum, og hvussu hesir møguliga verða brúktir. Um tú hevur onkrar spurningar ella viðmerkingar hesum viðvíkjandi, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum.

# Vit savna upplýsingar soleiðis:

### 1. Tá tú gevur okkum teir ella hevur givið okkum loyvi at nýta teir

**Skráseting** Tá tú sum tingmaður verður skrásettur á heimasíðu okkara, gevur tú okkum ávísar upplýsingar sjálvboðið. Hesir eru navn, teldupostur, vangamynd, føðingardagur.

### 2. Vit fáa eisini upplýsingar um teldilin, tá tú nýtir Løgtingsapp'una

Vit heinta upplýsingar um teldilin, sum tú nýtir, tá tú nýtir Løgtings app'una. Hesir upplýsingar eru slag av teldli, stýriskipan og upplýsingar um appuna, tá hon brádliga slóknar, fyri at skilja, tá okkurt ikki virkar. Hesir upplýsingar verða ikki knýttir at tínari kontu, so teir siga einki um teg. Antin heinta vit allar ella nakrar, sum avhongur av, hvat slag av teldli tú hevur, og hvussu hann er uppsettur. Fyri at vita meira um, hvørjar upplýsingar tín teldil gevur, vinarliga kanna politikkin hjá framleiðaranum av teldlinum ella ritbúnaðinum.

# Hvat vit gera við upplýsingar, sum vit heinta:

Vit nýta upplýsingarnar, sum vit heinta til at geva eina betri tænastu til tín. Vit vísa tilfar, ið er viðkomandi fyri teg.

Eisini av somu orsøkum nýta vit tínar upplýsingar á hendan hátt. Hetta er eisini grundleggjandi fyri tær tænastur, vit veita. Í stuttum er tað neyðugt fyri okkum at gera hetta fyri at gera tænasturnar viðkomandi, áhugaverdar og persónligar til tín. Eisini nýta vit í serligum umstøðum hesar upplýsingar til at: Senda tær tilfar við telduposti, tekst ella fráboðanir alt eftir, hvussu tín konta er uppsett ella, hvussu tín stýrisskipan er uppsett. Hvørja ferð vit senda tær tilfar, hevur tú møguleikan at frávelja tað.

# Flyting av upplýsingum:

Løgtingsappin er ein tænasta, ið verður nýtt av øllum tingmonnum. Við at nýta app'una, gevur tú okkum loyvi at flyta upplýsingar út um landaoddar til nýtslu hjá samstarvspartnarum grundað á tagnarskildu, sum tryggjar tínar upplýsingar eftir ES forskriftum. Vit taka serliga atlit, tá upplýsingar verða fluttir frá European Economic Area (EEA).

# Valmøguleikar, ið tú hevur við tínum upplýsingum:

Okkara mál er at geva tær einfaldar og týðandi valmøguleikar viðvíkjandi tínum upplýsingum. Um tú hevur eina Løgtingskontu, eru fleiri av tínum valmøguleikum bygdir beinleiðis til tína uppseting. Tú hevur eisini valmøguleikar tøkar **gjøgnum tín teldil**, sum geva atgongd til Løgtingappuna.

## Hvussu og nær vit deila tínar upplýsingar:

Okkara samstarvspartnarar vísa tilfar gjøgnum Løgtingsapp'una.

## Hvussu leingi hava vit tínar upplýsingar:

Vit hava bert tínar upplýsingar so leingi, sum tað er neyðugt fyri at veita tær tænastur, sum Løgtingsappin gevur fyri at røkka teimum endamálum, sum eru lýst í hesum politikki. Hetta er eisini støðan fyri ein og hvønn, sum vit deila tínar upplýsingar við, sum geva eina tænastu til tíni endamál. Tá vit ikki longur hava brúk fyri tínum upplýsingum, verða tær strikaðar ella gjørdar ópersónligar, so tú ikki kanst verða knýttur at teimum.

## Hvussu vit gera broytingar til hendan politikkin:

Um vit broyta hendan politikkin, so koyra vit broytingarnar út á hesa síðuna. Um tú heldur áfram at brúka Løgting eftir, at broytingar eru gjørdar, so samtykkir tú broytingarnar. Um broytingarnar hava stóran týdning, kunnu vit gera vart við hetta, sum lógin sigur.

## Samband:

Besti máti at seta teg í samband við okkum er gjøgnum teldupostin logting@logting.fo. Tú kanst eisini seta teg í samband við okkum á Løgtingið, Tinghúsvegur 1-3, 100 Tórshavn, Føroyar.
Galdandi frá 13. mai, 2019